# Kurt hevur úr at gera

**Nóg illa var Kurt Mørkøre komin til Norra, so vóru boð eftir honum – bæði sum bakari og venjari. Og av og á brúkar hann Jákup Mikkelsen sum málmansvenjara í lítla felagnum Eide.**

HILMAR JAN HANSEN

Ikki kann sigast annað, enn at Kurt Mørkøre fekk væl burtur úr fyrsta árið sínum sum venjari í føroyskum 1. deildarfótbólti.

Gamaní tók tað tíð hjá KÍ at koma í gongd í fjør, og steypakappingin var liðug, næstan áðrenn hon var byrjað. Men í landskappingini lyfti hann KÍ upp á bronsupláss.

Tí væntaðu og vónaðu klaksvíkingar, at Kurt fór at halda fram, so stolta felagið í Norðoyggjum kundi taka stigið víðari. Men flytifuglurin vildu tað øðrvísi.

Longu tvey umfør fyri kappingarenda í fjør gjørdi Kurt Mørkøre felagnum greitt, at leiðin av persónligum áðum aftur gekk til Norra, og at hann tí ikki var tøkur til venjarasessin hetta kappingarárið.

Men hóast ongar ítøkiligar fótbóltsætlanir vóru lagdar áðrenn fráferðina úr Føroyum, slapp Kurt ikki leingi at ganga arbeiðsleysur í Norra – hvørki so ella so.

– Vit komu til Norra tann 7. oktober, og longu dagin eftir hevði eg fingið arbeiði sum bakari. Á hesum sama bakaríinum starvaðist ein, sum spælir við Eide, og soleiðis vildi tað til, at eg longu tann 9. oktober – triðja dagin í Norra – hevði eg sett undirskriftina undir ein sáttmála sum venjari hjá felagnum, greiðir Kurt frá.

– Sáttmálin er galdandi í tvey ár og eg skal arbeiða sum venjari alt árið. Eg tók við liðnum tann 1. desember, og nú gleða vit okkum bara at koma í gongd við sjálva kappingina, ið byrjar 26. apríl. Vanliga spæla vit dyst leygardag, so tað órógvar heldur ikki bakingina hjá mær stórvegis.



*Kurt Mørkøre var venjari hjá KÍ í fjør, og tá ið hann fór aftur til Norra varð beinanvegin boð eftir honum sum venjari og bakari.*
Mynd: Álvur Haraldsen

### Liðini misjavna dygd

Eide spælir í norsku 3. deild, sum er fjórðbesta deildin í norskum fótbólti, og Kurt sigur hetta vera fótbólt á rættiliga breiðum stigi. Tey bestu liðini eru sum botnurin í føroysku 1. deild og tey vánaligastu sum tey bestu í føroysku 3. deild.

– Felagið er júst flutt upp úr 4. deild, og vónirnar vóru ongar um, at liðið skuldi annað enn upp at venda í 3. deild. Men nú vit hava vunnið átta av okkara ellivu venjingardystum, er hugburðurin broyttur nakað, greiðir Kurt frá.

– Optimisman er blivin nakað størri, tí venjingardystirnir hava verið móti liðum, ið ikki skuldu verið verri enn vit. Eitt nú hava vit vunnið á onkrum liðið úr deildini oman fyri okkum.

Tá fyrireikingarnar til komandi kappingarárið byrjaðu í Eide, vóru dygdirnar á liðnum rættiliga misjavnar, men av tí at nakrir spælarar eru komnir til felagið, eftir at eitt annað lið tók seg úr kappingini, hevur Kurt Mørkøre ein breiðan og javnt góðan hóp at arbeiða við.

Sjálvur heldur hann, at fleiri av spælarunum á liðnum hjá Eide eru heilt góðir, og einir tríggir ella fýra av teimum høvdu sloppið á eitt og hvørt lið í bestu føroysku deildini.

### Hjálpandi hond frá Jákupi

Eide liggur beint uttan fyri Molde, og tí hevur Kurt gott samband við ein annan klaksvíking á leiðini, Jákup Mikkelsen. Moldemálverjin hevur enntá hjálpt til við málmansvenjingini í Eide av og á, so teir samstarva javnan.

– Tað er eingin trupulleiki fyri felagið hjá Jákupi, tí í Molde hava teir hava ein politikk, sum sigur, at teir heldur enn gjarna mugu hjálpa teimum smærru feløgunum í nærumhvørvinum, og tað er so komið okkum til góðar við góðum ráðum frá Jákupi, sigur hann.

Sjálvur er 34 ára gamli Kurt Mørkøre eisini virkin á vøllinum, og leiklutur hansara sum spælandi venjari hevur við sær, at hann spælir í miðverjuni á liðnum hjá sær.

Nær vit skulu vænta at síggja nakað til Kurt aftur í føroyskum fótbólti, er ivasamt, tí fyribils hevur hann so henda tvey ára sáttmálan at uppfylla í Eide. Men hann ivast ikki í, at hann verður fleiri royndir ríkari, tá ella um hann eina ferð vendir heimaftur til føroyskan fótbólt:

– Tað er sjálvandi eitt sindur øðrvísi at vera venjari her, men eg stórtrívist. Og tær royndir, eg fái her, skuldu bara gjørt meg til ein enn betri venjara, sigur bakarin úr Klaksvík at enda.

Forkunnug er norska tilveran honum neyvan, tí gerandisdagurin er nøkulunda tann sami, sum hann hevur verið so ofta fyrr: Upp á miðjari nátt at baka og síðani ein blundur, áðrenn venjingin er á skránni.

# Ingi trívist væl í Arsenal

**Í fjør var Ingi Højsted nógv skaddur, men nú spælir hann við fullari ferð og nærkast alsamt A-landsliðnum**

EYÐUN KLAKSTEIN

Eingin føroyskur spælari spælir fyri kendar felag, enn ungi Ingi Højsted ger. Hann kann breggja sær av, at hansara felag er Arsenal.

Enska stórfelagið telist millum tey bestu í Europa, og í heimligu kappingini í Onglandi eru teir meistarar. Næstu vikurnar skulu teir verja hetta meistaraheitið.

Ingi Højsted hevur sáttmála við Arsenal, og hann spælir fyri U-17 liðið hjá felagnum.

Í fjør var Ingi nógv darvaður av álvarsligum skaða, men í ár hevur hann spælt við fullari ferð, og tað hevur gingið væl hjá honum.

Ingi trívist væl í Arsenal, og tað verður spennandi at fylgja unga spælaranum næstu árini.

Tá ið A-landsliðið var á venjingarlegu í Spania fyrr í ár, var Ingi Højsted ein av spælarunum, sum var við á hesi venjingarlegu.

Hann stóð seg væl, og tá ið Henrik Larsen fer at seta liðið til fyrra dystin ímóti Kasakstan síðst í hesum mánaðinum, kann tað vera, at Ingi Højsted kemur upp á tal. Landsliðsvenjarin ætlar nevniliga at brúka ungar spælarar í fyrra dystinum.











